## Tí valdi nevndin hesa loysnina

John Petersen og Mikkjal Thomassen. Eitt venjarapar, sum í stóran mun hevur sín samleika í B36. Báðir umboðaðu felagið í fleiri ár sum leikarar. Tað hevur verið at hoyrt í fleiri mánaðir, at teir skuldu seta seg í venjarasessirnar. Nú er tað staðfest. Partarnir hava støðugt tosað saman, og seinastu luturnir komu upp á pláss um vikuskiftið. Sámal Ímundarsson sigur, at báðir eru høvuðsvenjarar, og tað er ein fyrimunur. – John og Mikkjal eru ikki líkir sum persónar, og vit halda, at teir standa sterkir sum ein eind. Soleiðis stuðla teir hvør øðrum, sigur hann. *Men hvørgin hevur stórvegis úrslit at vísa á sum venjarar. Hví meta tit, at teir kunnu venda kósini?* – Mikkjal hevði eina nærmast ómøguliga uppgávu sum venjari í 2009, tá B36 var í niðurflytingarvanda. Hann hevur ikki havt karmarnar at prógva sítt virði. John var partur av venjaratoyminum hjá AB sama ár, og argjamenn stóðu seg væl, vísir formaðurin á. Hann váttar, at nevndin hevur tosað við aðrar venjarar, men tað hevur allatíð verið ætlanin, at John Petersen og Mikkjal Thomassen skuldu standa á odda fyri liðnum.



# John hevur ongan fyrimun

**FÓTBÓLTUR** John Petersen hevur hetjustøðu millum B36-fjeppararnar við sínum 162 málum í 184 dystum fyri felagið. Tað gevur honum hinvegin ikki stórvegis fyrimunir í venjarastarvinum, heldur hann

Uni Holm Johannesen

Hann var gitin sum málrevurin í B36. Hann var vanliga púra kaldur, tá hann fekk møguleikan.

Tað prógva hagtølini væl og virðiliga. Sambært faroesoccer.com, hevur hann skotið 162 mál í 184 dystum fyri B36. Tað hevur givið honum sanna hetjustøðu millum hvítu og svørtu fótbóltsfjepparanar í Havn.

Nú hava hann og Mikkjal Thomassen tikið fast um stýrisvøllin á B36-skútuni. Árstalsfelagið kunngjørdi á sínari heimasíðu um vikuskiftið, at John Petersen og Mikkjal Thomassen skulu stjórna besta mansliðnum hjá B36 næstu tvey árini.

Tað eru sjey ár síðan, at fyrrverandi landsliðsframherjin veittraði felagnum farvæl. Hann hevur síðan roynt seg sum venjara á Skála og AB, umframt at hann var hjálparvenjari á føroyska landsliðnum.

Nú fer hann aftur at hava sína dagligu gongd í B36-húsinum. John Petersen væntar ikki, at hansara avrik sum leikari fara at hjálpa honum í hesum venjarastarvinum.

– Eg kenni væl umstøðurnar og felagið sum heild. B36 er mítt fótbóltsheim. Sigfríður Clementsen stóð seg væl sum spælari her, og hann hevur áður vunnið føroyameistaraheitið og steypakappingina við B36. Hann var hinvegin viðfarin eins og aðrir venjarar í fjør. Mín fortíð í felagnum verður ikki ein fyrimunur í so máta, sigur John Petersen.

### Eingin málsetningur enn

Úrslitini hjá B36 hava ikki verið nøktandi seinastu tvey kappingarárini. Liðið hevur ikki spælt seg í Evropa. Undirtøkan hevur eisini verið minkandi. Færri og færri áskoðarar hava verið til heimadystirnar í Gundadali.

John Petersen veit ikki at siga, hvør málsetningurin er fyri kappingarárið 2011. Tað er ikki greitt, hvussu endaligi hópurin fer at síggja út, og tað ber illa til at gera greiðar niðurstøður í løtuni.

Hjalgrím Elttør, Magnus Olsen, Bárður Olsen, Christian Mouritsen og Jónas Tór Næs eru farnir í annað felag.

– Vit royna fremst av øllum at fáa nýggjar spælarar í hópin, sum skulu loysa hinar av. Vit hava víst áhuga í fleiri spælarum, men tað eru vit ikki einsamallir um. Eingin veit at siga, hvør hópurin verður, áðrenn flytingarvindeygað letur aftur tann 23. februar. Tá vita vit, hvørji mál eru realistisk at seta sær, sigur John Petersen.

> **Eg kenni væl umstøðurnar og felagið sum heild. B36 er mítt fótbóltsheim**




*John Petersen skoraði 162 mál í 184 dystum fyri B36*

*Savnsmynd*

# Óvist við Jankovic og Herbert

**FÓTBÓLTUR** Sámal Ímundarsson, formaður, veit framvegis ikki at siga, um Dmitrije Jankovic og Herbert í Lon Jacobsen verða partar av hópinum hjá B36 í 2011. – Dmitrije er ikki ungur í fótbóltshøpi longur, sigur hann

Uni Holm Johannesen

Vit vita ikki í løtuni, er stutta svarið hjá Sámali Ímundarsson, tá hann verður spurdur, um Dmitrije Jankovic og Herbert í Lon Jacobsen spæla við B36 í ár.

Dmitrije Jankovic skifti aftur til árstalsfelagið undan kappingarbyrjan í fjør. 35 ára gamli verjuleikarin hevði stór sveiggj í sínum avrikum. Nú nevndin so smátt er í holt við at byggja eitt nýtt lið upp frá grundini, er ikki vist, at tað verður pláss fyri serbanum.

– Hann er ikki ungur í fótbóltshøpi longur. Dmitrije veit, at hann skal ikki bíða eftir okkum, um hann fær tilboð frá øðrum feløgum. Spurningurin er, um B36 hevur fíggjarliga orku at hava hann í hópinum. Vit vóna at svara spurninginum skjótast tilber, sigur Sámal Ímundarsson.

Herbert í Lon Jacobsen hevur boðað frá, at hann umhugsar, um hann fer at spæla fótbólt yvirhøvur.

*uni@sosialurin.fo*

# Tveir royndarvenja við B36

**FÓTBÓLTUR** Rógvi Baldvinsson og Kenneth Monsen, sum seinastu mánaðirnar hava spælt við Ålgard í triðbestu norsku deildini, royndarvenja við B36 hesa vikuna

Uni Holm Johannesen

Tað sigur Sámal Ímundarsson, formaður í B36.

Rógvi Baldvinsson er 21 ára gamal verjuleikari. Hann hevur verið partur av føroyska U21-landsliðnum, umframt at hann var við í landsliðshópinum hjá Brian Kerr í vetur.

Kenneth Monson er 21 ára gamal miðvallari. Hann hevur áður spælt við Bryne í næstbestu deildini, umframt Ålgard.

– Vit kenna Rógva Baldvinsson, men vita lítið og einki um Kenneth Monsen. Teir venja við næstu dagarnar, og síðan taka venjararnir støðu til, um teir kunnu gagna liðnum. Vit fáa at síggja, sigur Sámal Ímundarsson.

*uni@sosialurin.fo*